Eingin tikin

INNBROT
Stefan í Skorini

Enn er eingin tikin í sambandi við innbrotið í Litaval í Runavík mánamorgunin, har innbrotstjóvurin slapp avstað við 10.000 krónum.

Løgreglan kannar málið í løtuni og hevur fingið fleiri spor at ganga eftir. Onkur hevur ringt inn til løgregluna við einum tipsi, sum kann hjálpa teimum at finna gerningsmannin.

Sosialurin skrivaði í týsdagsblaðnum, at maðurin var myrkhærdur og helst í aldrinum 18 til 20 ár. Hetta hevur fingið onkran at gera vart við seg hjá løgregluni, og hesar upplýsingar kunnu vera avgerandi.

Annars er einki beinleiðis gjøgnumbrot gjørt í hesum málinum enn.

Sáttmálin um samanlegging undirskrivaður

SAMANLEGGING
Stefan í Skorini

Mikukvøldið skrivaðu borgarstjórarnir í Skála og Runavíkar kommunu undir sáttmálan um samanlegging av kommununum.

Hetta varð gjørt í býráðshúsinum í Saltangará, har nýggja býráðið eisini fer at hava høvuðssæti. Kári Johannesen og Rodmundur Nielsen, borgarstjórar, fingu dygga undirtøku fyri samanleggingini, tá uppskotið varð lagt fyri fólkið mánadagin.

Samanleggingin verður framd í verki 1. januar 2005. Hetta er samstundis sum nýtt býráð tekur við eftir kommunuvalið í 2004. Tá verður bara ein kommunua, og hon fer at eita Runavíkar kommuna.

Spennandi verður at síggja, um fleiri kommunur fara at taka henda táttin upp til nærri viðgerðar, nú landsstýrið fer at leggja alt fleiri uppgávur út til kommunurnar at umsita.

Fútin steðgar bygging

Mynd: Byggingin úti í Bakka er steðgað. Fútarætturin metti, at byggiloyvið varð tikið aftur í brævinum frá landsstýrinum tann 3. oktober, har greið boð vórðu givin um at steðga byggingini

Mynd: Jens Kr. Vang

Dómarin ivaðist ikki, men setti fútaforboð móti byggingini hjá Jóhan M. Mac Donald úti í Bakka. Byggingin skal steðga beinanvegin, og tað er revsivert at halda fram

FÚTAFORBOÐ
Stefan í Skorini

Seinasti naglin er negldur í sethúsini úti í Bakka á hesum sinni. Fútarætturin viðgjørdi hósmorgunin umsóknina frá Tórshavnar Býráði um at seta forboð móti byggingini. Býráðið hevði tó sjálvt givið loyvi til tess, men fekk boð úr landsstýrinum um at steðga byggingin, og tað varð gjørt.

Landsstýrið metti, at býráðið við byggiloyvinum breyt byggisamtyktina fyri hetta økið, tí økið varð kannað almennum stovnum og skrivstovum.

Sorinskrivarin segði, at góðar grundgevingar vóru fyri at steðga byggingini, og tað verður gjørt beinanvegin. Tað er harafturat revsivert at halda fram við at byggja sethúsini.

Nú skal hesin dómurin staðfestast í einum staðfestingarrættarmáli, har málið verður gjøgnumgingið meira nágreiniliga, og partarnir verða av hoyrdir. Orsøkin er, at fútarætturin er bara ein fyribils rættur, sum ikki kann taka endaliga støðu. Hetta málið skal leggjast fram, áðrenn sjey dagar eru farnir, tí annars dettur fútaforboðið burtur.

Dómarin metti, at byggiloyvið varð tikið aftur við brævinum frá landsstýrinum 3. oktober.

Endurgjald

Tað er tó lítil ivi um, at Jóhan Mac Donald fer at krevja endurgjald, um ætlaðu sethúsini verða av ongum, tá býráðið í tveimum førum gevur honum loyvi at byggja, men síðani tekur tað aftur. Slíkum sleppur býráðið neyvan órevsað frá.

Sakførari hansara segði í rættinum, at hansara klientur hevði havt stórar útreiðslur av byggingini, og tí var tað av stórum týdningi.

Landsstýrið góðkendi annars leigusáttmálan millum býráðið og Jóhan Mac Donald, og býráðið gav byggiloyvi. Síðani steðgaði landsstýrið byggingini, men býráðið staðfesti, at talan var um eitt smávegis frávik frá byggisamtyktini, men hesum vísti landsstýrið aftur. Nú er byggingin í øllum førum steðgað.

Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára føðingardegnum 24. september.

Klæmint Nicodemussen

Sosialurin
Sosialurin i

Føroyar og framtíðin

Almennur politiskur fundur verður í B36 húsinum mikudagin tann 17. oktober kl. 19.00

Tað er Sjálvstýrisflokkurin í Suðurstreymoy sum skipar fyri.

Helena D. á Neystabø, floksformaður og sil lagtinga- og landsstýrismaðurin sjálvstýrisflokksins vera við á fundinum, har tú fært svar uppá so nógvar spurningar, sum tú hevur hug at seta um Føroyar og framtíðina

Skulu vit stríðast fyri sjálvsavgerðarmarkti Føroya, og hvussu við livifótinum?

Hvat er munurin á sjálvstýrispolitikkinum hjá Sjálstýrisflokkinum og hjá hinum flokkunum?

Skulu vit "bara lata Danmark betala"

Eru vit før fyri at framleiða velferð?

Og hvussu vil sjálvstýrisflokkurin prioritera velferðina?

Er tað oljan sum skal tryggja okkum sjálstýri?

Kom á fund og sig tína hugsan um, hvussu vit savna føroyingar um ein tryggan sjálvstýrispolitikk

Suðurstreymoyar Sjálstýrisfelag